

*Teir bilaeigarar, ið hava stevnt, skulu hava endurgoldið MVG´ið av skrásetingargjaldinum*

*Savnsmynd*

# Bileigarar skulu hava MVGið aftur

**Málið um meirvirðisgjaldið av skrásetingargjaldinum á nýggjum akførum hevur verið fyri Føroya Rætti týsdagin, og dómur er fallin. Bileigarar skulu hava mvg'ið afturgoldið, var niðurstøðan**

MVG-MÁLIÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Føroya Rættur kom týsdagin til ta niðurstøðu, at innkrevjingin av meirvirðisgjaldinum av skrásetingargjaldinum av nýggjum akførum í tíðarskeiðnum frá 1. mai 1999 til 28.apríl 2005, var uttan heimild, og at teir bileigarar, sum hava stevnt eftir hesum endurgjaldi, hava rætt til at fáa MVG'ið goldið aftur.

Rættiliga nógv fólk valdu at stevna TAKS og bilasølunum, eftir at hetta mál kom undan kavi í 2005, og av tí at talan vildi verða um so nógv mál, og tey flestu líktust, vóru fýra mál tikin burturúr rúgvuni, sum skuldi roynast sum prinsippmál.

Tað vóru tveir kendir persónar, hvørs mál skuldu roynast í rættinum, nevniliga Bjørn á Heygum, advokatur og Rodmund Nielsen, táverandi løgtingsmaður.

Úrskururin var, at teir fingu viðhald í øllum ákærum, og sostatt eiga teir bileigarar – og bert teir – sum hava stevnt bilasøluni eftir at fáa hetta endurgoldið, at fáa peningin aftur.

### Bilasølurnar skulu gjalda fyrst

Ein av úrskurunum hjá Føroya Rætti var, at í teimum førum har tað ber til, eru tað bilasølurnar, ið skulu gjalda keyparunum peningin aftur, og síðani skulu bilasølurnar krevja peningin aftur frá TAKS. Men í teimum førum, har bilasølan ikki er til longur, er tað bert TAKS, ið stendur eftir, og er niðurstøðan at í teimum førum eigur TAKS at gjalda peningin aftur til keyparan.

### Bert tey sum stevndu

Men tað eru ikki øll, ið fáa peningin afturgoldnan. Í roynd og veru er talan bert um ein evaraskalítlan brotpart av fólkunum, ið fáa nakað sum helst afturgoldið.

Bert tey, ið hava stevnt áðrenn fyrningarfreistin, sum er 5 ár, var úti, fáa hava rætt til endurgjald, og sum skilst er talan bert um í mesta lagi 100 av kanska 3000 til 4000 bileigarum, sum hava gjørt tað.

Bert tey, ið hava keypt bil í tíðarskeiðnum frá 29. desember 2004 til 27.apríl 2005, kunnu sostatt enn stevna eftir hesum endurgjaldi. Hjá restini er fyrningarfreistin farin, og einki gerst fyri at steðga tí, heldur ikki skriv ella munnligir fyrispurningar til bilasølur ella TAKS.

### Kæra møguliga dómin

TAKS hevur boðað frá, at TAKS hevur enn ikki tikið støðu til, um dómurin hjá Føroya Rætti verður tikin til eftirtektar, ella um dómurin verður skotin inn fyri Eystara Landsrætt. TAKS tekur støðu til spurningin um, hvørt dómurin verður skotin inn fyri Eystara landsrætt fyrst í komandi ári.



SOZOPREPRESS

## P/F Fiskaaling søkir granskara

Søkt verður eftir granskara at arbeiða við framleiðslu av plantu- og djóraæti. Í samband við yngulframleiðslu av marinum fiskasløgum framleiðir Fiskaaling djóraæti í stórum sjógvhyljum á royndarstøðini í Nesvík. Í løtuni verður arbeitt við fáa betur innlit í framleiðsluna. Í hesum sambandi verður søkt eftir granskara at taka lut í hesum arbeiði.

**Førleikar**

- tú hevur viðkomandi útbúgving, universitetsútbúgving í lívfrøði ella líknandi
- tú hevur góð samstarvsevni
- tú ert nýhugsin og ágrýtin
- tú dugur at samskifta á enskum

Í verkætlanini verður arbeitt tætt saman við granskarum á Fiskaaling og á Havstovuni. Høvuðsaktiviteturin verður at standa fyri ætiframleiðslu í Nesvík, taka sýni og kanna hesi. Í samband við sýnini inngongur m.a. at eyðmerkja plantu- og djóraæti. Neyðug upplæring verður veitt til hetta arbeiði. Góður møguleiki er fyri framhaldandi granskingarstarvi. Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Øystein Patursson á tlf 214787 ella Ingolf Joensen á tlf 214747.

Umsókn við avritum og møguligum ummælum, skal sendast til:

**P/F Fiskaaling**
Við Áir
FO-430 Hvalvík

ella

fiskaaling@fiskaaling.fo

Umsóknin skal vera komin fram í seinasta lagi 11. januar 2010. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík og í Skopun. Samlaða starvsfólkatalið er umleið 20, herav fleiri granskarar. Virksemi fevnir um at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, herundir verkætlanir innan matvørugóðsku, aliumhvørvi, fóður, vatn, framleiðsluhættir, nýggj aliøkir, aling á harðbalnum økjum v.m. Meiri fæst at vita á www.fiskaaling.fo

P/F Fiskaaling | Við Áir | www.fiskaaling.fo